# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Politiskt juristarí

Tørvurin hjá føroyskum barnafamiljum hevur í tvey ár verið forsømdur, tí politiski myndugleikin ikki hevur vilja tikið støðu til, hvørt talan er um skatt ella serstakt gjald, tá rindað verður til skipanir sum eitt nú ALS ella Barsilsskipanina.

Fyri vanliga borgaran man hetta annars ikki vera so trupult at skilja. Á kontoavritum okkara stendur í øllum førum, hvat er skattur og hvat onnur gjøld fevna um. At onkrir tilvildarligir juristar so ikki eru av somu fatan, er ein onnur søk.

Men tað er merkisvert, hvussu stórt vald ávísir løgfrøðingar tykjast hava á politisku skipanini. Tá málið um broytingar í ALS skuldi leggjast fram fyri tveimum árum síðani, varð hetta blokerað av løgtingsformanninum, sum metti, at tað bert er løgtingið, sum hevur heimild at krevja skatt. Og sambært hansara ráðgeving var eingin ivi um, at talan er um skatt. Hetta út frá nøkrum ávísum kriterium, sum eisini onnur lond nýta.

Tað merkisverda í hesum er, at í undirskjali til sama tingmál eru nakrir av fremstu løgfrøðingum okkara, sum staðfesta, at spurningurin um skatt ella ikki als ikki er nakar trupulleiki. Stutt sagt, so er staðfestingin frá hesum, at vil Løgtingið at eitt nú ALS ella Barsilsskipanin sjálv áseta gjald sítt, so er hetta eingin trupulleiki. Føroyska stýrisskipanin inniheldur ikki nakran stjórnarrætt, sum skal taka støðu til slík mál, og tí er tað í evsta føri tingsins vilji, sum er avgerandi í slíkum føri.

Hvør tingsins vilji er, fæst tó ikki at vita, fyrr enn málið verður lagt fram. Og føroyskar barnafamiljur hava ikki stundir at bíða í áravís eftir juristaríi ella politiskari forfeingiligheit frá landsins leiðandi monnum.

**Sosialurin**

## Vit eru provokerað!

YVIRLÝSING

Nú um dagarnar fingu 15 starvsfólk í P/F Postverki Føroya uppsøgn. Hetta er gjørt fyri at provokerað Postfelagið til at ganga frá vunnum rættindum. Postfelagið skal víkja frá galdandi sáttmála, sum annars er í gildi til 1. oktober í 2007.

Hetta minnir ikki sørt um yvirgangsvirksemi frá leiðsluni í P/F Postverki Føroya. Tí hetta stig verður tikið í friðartíð, har sáttmáli er galdandi, og tí kann hetta valla tulkast øðrvísi enn krígsavbjóðing, har leiðslan hevur slept fyrstu bumbuni, og 15 fólk lóu eftirá. Offrað sum finnan í talvi.

Leiðslan í P/F Postverki Føroya roynir at provokera Postfelagið. Tað hevur eydnast tykkum at provokera ikki bara Postfelagið, men onnur við. Tað hevur eydnast tykkum at skapa ótta og máttloysi ímillum starvsfólkið. Hetta vænta tit fer at skapa eina mentanar- og hugburðsbroyting.

Fakfeløgini átala harðliga, at slíkar mannagongdir verða brúktar, og vit kunnu ikki annað enn spyrja politikska myndugleikan:

• Er hetta sanna andlitið á einskiljingunum?

• Er politiski viljin, at fakfeløg og vunnin rættindi skulu verða týnd?

• Taka tit undir við handfaringini hjá leiðsluni í P/F Postverki Føroya?

**Starvsmannafelagið**
*Gunnleivur Dalsgarð*

**Føroya Lærarafelag**
*Magnus Tausen*

**Føroya Pedagogfelag**
*Jarvin Hansen*

**Almanna- og heilsurøktarafelagið**
*Majbritt Mohr*

## Altjóða flóttafólkadagur – 20. juni

20. juni er altjóða flóttafólkadagur. Upprunaliga var 20. juni flóttafólkadagur fyri Afrika, men í 2000 avgjørdi ST tó í serligari aðalfundarsamtykt, at dagurin skuldi kallast World Refugee Day. Endamálið við degnum er at fáa øll heimsins samfeløg at hugsa um tey umleið tíggju milliónir flóttafólkini (størsti parturin í Afrika), ið óætlað eru vorðin heimleys í orðsins víðastu merking. Altjóða flóttafólkadagurin roynir at:




(1) Kasta ljós á sera truplu og syrgiligu støðuna hjá flóttafólkum og (tvingsuls)fluttum fólki.

(2) Seta "gloymd" flóttafólk og flóttafólkakreppur í fokus.

(3) Minna londini á teirra skyldur, tá tað ræður um at verja flóttafólk og (innlendis) flutt fólk.

Menningarlond hýsa umleið 80 prosent av øllum flóttafólkum heimsins, harav nógv lond framman undan hava ilt við at verja rættindini hjá sínum egnu íbúgvum. Flestu flóttafólkini liva í sera vandamiklum umstøðum, í eini millumstøðu uttan viðurkenning, har ongin vegur gongur aftur ella fram. Einans fá eru í støðu, har tey veruliga fáa ein nýggjan møguleika, eina nýggja byrjan og kunnu fóta sær í samfelagnum.

Í framkomnum ídnaðarlondum gerst støðugt truplari hjá flóttafólkum at finna verju. Mørkini eru stongd og nýggjar lógir forða flóttafólkum at sleppa avstað. Altjóða flóttafólkadagurin skal fáa okkum at hugsa um rættindini hjá teimum neyðstøddu flóttafólkunum. Talið á flóttafólkum í heiminum er minkað seinastu árini, men tað merkir ikki at trupulleikin er horvin. Sera nógv flóttafólk, ið eru farin aftur til heimlond síni, ofta ímóti egnum vilja, hava sera vánalig livikor – til dømis í Irak, Afganistan og Burundi.

Og hóast flóttafólkini kanska eru færri í tali nú, so eru í minsta lagi 25 milliónir fólk "flóttafólk" í egnum landi (Internally Displaced Persons) vegna kríggj, ófrið, náttúruvanlukkur o.s.fr. Tað er alneyðugt at fáa politikarar kring heimin at halda uppat við at skapa ræðumyndir av innflytarum og flóttafólkum, ið søkja um uppihaldsloyvi. Vit mugu minnast til, at altjóða samfelagið hevur skyldu at verja og hjálpa neyðstøddum flóttafólkum – sama hvørja bakgrund hesi hava.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.